*Í mun til, tá ovastevnan varð best vitjað, var lutfalsliga lítið fólk at síggja í gøtunum í Nólsoy á ovastevnu í ár*






*- Er føroyska mentanin so skirvislig, at nakrir ungir vegetarar kunnu seta hana í vanda, spyr Linjohn Christiansen, borgarstjóri og grindaformaður*

# Fyrr var grindadráp eitt satt djóramorð

## - Í dag hava vit føroyingar eitt vælskipað grindadráp, men tað er ikki okkum fyri at takka. Ágangurin uttanífrá gjørdi støðuna til tað, hon er í dag, sigur Linjohn Christiansen, borgarstjóri og grindaformaður

**Vilmund Jacobsen**

Sandoyggin hevur verið nakað í fokus, nú felagsskapurin Sea Shepherd er í Føroyum og ansar eftir, at føroyingar ikki drepa hval. Borgarstjórin í Skopunar kommunu, Gerhard Lognberg, hevur sagt sína meining um virksemið hjá SS-fólkunum, og tað hevur borgarstjórin í Sands kommunu, Brandur Sandoy, eisini. Bæði í Skopun og á Sandi hava kommunurnar stongd bátadráttir fyri Sea Shepherd-fólkum, og á Sandi hevur borgarstjórin sýtt hesum fólkum atgongd til ment wc og teir fasilitetir, sum kommunan annars bjóðar fólki í oynni og ferðafólki annars sum koma á vitjan.

Á sínari facebook-síðu skrivar borgarstjórin í Skálavíkar kommunu, Linjohn Christiansen, sunnumorgunin nakrar reglur um hesi viðurskifti. Umframt at vera borgarstjóri, er hann eisini grindaformaður.

Borgarstjórin í Skálavíkar kommunu tekur ikki undir við Sea Shepherd, sonevndu generalunum aftanfyri felagsskapin og teirra "propagandamaskinu", sum hann rópar tað.

Linjohn Christiansen ásannar, at tað er ógjørligt hjá okkum føroyingum at vinna á Sea Shepherd. Hinvegin heldur hann, at føroyingar kunnu vinna á hesum fólkum við at fáa tey í part við okkum, sum eina møguliga loysn á einum trupulleika.

- Í dag hava vit væl fyriskipað grindadráp, men tað er ikki føroyingum fyri at takka. Fyrr var grindadráp eitt satt djóramorð. Ágangurin uttanífrá gjørdi støðuna til tað, hon er í dag.

Linjohn kallar sítt íkast á facebook til kjakið um Sea Shepherd "Mentan, vegetarar og skoynisoppar..."

- Undir amerikanska borgarakrígnum helt Abraham Lincoln røðu, har hann við sympatii umrøddi rebellarnar í suðurstatunum. Røðan fekk øði í eina eldri kvinnu, sum við lív og sál helt við norðurstatunum. Hvussu liga um tínar fíggindar. Skuldi tú ikki heldur hugsað um at beint fyri teimum? Spurdi kvinnan.

Linjohn Christiansen vísir á, at svarið hjá Abraham Lincoln er vorðið klassiskt:

- Sig mær kvinna. Beini eg ikki fyri mínum óvinum, um eg geri teir til vinir mínar.

Í sínum íkasti á síni facebook-síðu spyr borgarstjórin, um tíðin ikki er komin til, at vit føroyingar strúka okkum um ennið.

- Er føroyska mentanin so skirvislig, at nakrir ungir vegetarar kunnu seta hana í vanda nakrar krákumánaðar. Hesi ungfólk eru ikki nøkur brótaraross, ið vilja gera seg inn á mentan okkara. Endamálið er eittans - at verja nøkur djór, sum tey eru góð við. Tey eru sera bilsin av okkara vøkru náttúru og framkomna landi.

Linjohn Christiansen gevur fólki rætt í, at ein skynsamur almennur politikkur at takla støður sum hesa væl kundi verið meira frammi.

- Ein felags niðurstøða er nógv sterkari enn tað, sum nú gongur fyri seg. Mín støða er greið. Mær dámar betri støðuna hjá Abraham Lincoln enn hana hjá konuni. Haldi ikki, vit skulu vera smásár, men heldur lata hesi ungu sleppa avstað aftur uttan daprar upplivingar, sigur borgarstjórin og grindaformaðurin í Skálavík.



# Húkaflotin í gongd aftur

**Vilmund Jacobsen**

- Nú eru fleiri línuskip farin aftur til fiskiskap eftir summarsteðg, og vit vænta, at trý línuskip koma inn at landa síðst í hesi vikuni.

Fiskamarknaður Føroya veit at siga, at tvey skip hava svartkalva, og eitt línuskip kemur við brosmu og longu.

- Restin av línuflotanum eru antin nýliga farin útaftur - ella er ávegis til fiskiskap.

Lagt verður aftrat, at línuskipini, sum eru til fiskiskap, í størstan mun fiska brosmu og longu.

- Eitt skip er á Íslandsrygginum og fiskar tosk, og eitt skip er í Eysturgrønlandi.

Sosialurin kann leggja aftrat, at línuskipið, sum er í Eysturgrønlandi, er Sandshavið.

Um útlitini til útróður, veit Fiskamarknaður Føroya at siga, at veðrið sær út til at fara at roynast, og streymurin verður góður.

- Tí vænta vit, at nakað verður av útróðri í hesi vikuni, sigur marknaðurin í sínum metingum fyri hesa vikuna.



**» Veðrið royndist skiftandi á ovastevnu, og viðhvørt regnaði. Hesar tríggjar gellurnar dugdu tó at lata seg í, áðrenn tær fóru í dansin.**

# Bátar í hørðum mótstreymi um Brúnna



*Stórur áhugi var fyri regattasiglingini hjá Hósvíkar Róðrarfelag í ár.*

Mynd: Birgir W. Høgnesen

## Tá bátarnir, sum vóru við í regattasigling av Eiði til Hósvíkar seinnapartin fríggjadagin, nærkaðust Brúnni við Streymin, komu teir í harðan mótstreym

**Vilmund Jacobsen**

Stór undirtøka var fyri árligu regattasiglingini, sum Hósvíkar Róðrarfelag skipaði fyri fríggjadagin.

Sambært skránni skuldu bátarnir fara av Eiði klokkan 17 henda dagin, og síðan varð stevnt suður gjøgnum Sundalagið ávegis til Hósvíkar.

Tá bátafylgið nærkaðist Brúnni við Streymin, vísti tað seg, at tað rættiliga var farið at reka norður, og hetta elvdi til ávísar trupulleikar hjá bátum, ið ikki hava so stóra maskinorku.

Alt tørnaði tó væl út, men væntandi er, at tey, sum skipa fyri regattasigling, fara at ansa enn betri eftir eitt annað ár, soleiðis at løtan, tá siglt verður um trongan undir Brúnni, verður betri tilpassað rákinum.